# Høgni vil vita, hvør skrivar tíðindaskriv fyri Bárð

**Høgni Hoydal vil hava Bárð Nielsen, landsstýrismann, at siga løgtinginum, hvør hevur skrivað tíðindaskrivið, sum hann sendi út 25. mars og legði á heimasíðuna hjá Fíggjarmálaráðnum. Hann heldur skrivið vera so vánaligt, at tað má verða skrivað av onkrum, sum ikki hevur politiskt innlit**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*– Tíðindaskrivið frá Bárði Nielsen er so illa skrivað, at einki embætisfólk kann hava skrivað tað, heldur Høgni Hoydal, fyrrverandi landsstýrismaður. Hann vil hava Bárð Nielsen at greiða løgtinginum frá, hvør hevur skrivað tíðindaskrivið, hann sendi út 25. mars*

Høgni Hoydal vil hava Bárð Nielsen, landsstýrismann í fíggjarmálum, at siga tinginum, hvør hevur skrivað tíðindaskrivið, sum er lagt á heimasíðuna hjá Fíggjarmálastýrinum 25. mars í ár.

Hetta spyr hann um í einum munnligum fyrispurningi, sum landsstýrismaðurin skal svara á tingi í dag.

– Hevur landsstýrismaðurin goldið privatari fyritøku ella privatpersóni fyri at skriva tíðindaskrivið?

– Hava embætisfólk í Fíggjarmálaráðnum góðkent innihaldið í tíðindaskrivinum og kunnu tey vátta og taka ábyrgd av, at upplýsingarnar og orðingarnar í tíðindaskrivinum eru rættar? spyr Høgni Hoydal.

Hann spyr eisini, um landsstýrismaðurin kann skjalprógva upplýsingarnar í tíðindaskrivinum um, at »landsstýrið skal gjalda eina rokning uppá 280 milliónir krónur« og at framskrivingar vístu eitt »hall upp á smáar 400 mió. kr., áðrenn avdráttir.«

– Hvar og á hvørjum kontum hevur landsstýrismaðurin spart góðar 120 milliónir krónur, sum tíðindaskrivið upplýsir um, spyr Høgni Hoydal.

Hann vísir á tíðindaskrivið, sum varð sent út 25. mars, har landsstýrismaðurin m. a. segði, at:

– at hann hevur arvað eitt hall á fíggjarlógini frá undanfarnu samgongu

– at uppruddingin eftir fullveldisbúskapin er byrjað

– at framskrivingar vístu eitt hall uppá smáar 400 milliónir krónur

– at samgongan hevur verið ígjøgnum flestu kontur í fíggjarlógini og gjørt sparingar

– Í teimum tølum, landsstýrismaðurin síðani sjálvur hevur lagt fram, verða hesar upplýsingar afturvístar, sigur Høgni Hoydal. Hann vísir á, at undanfarna samgonga varð steðgað í sínum arbeiði 5. desember 2003. Hann vísir eisini á, at úrslitið hjá landskassanum fyri 2003 vísir sambært landsstýrismanninum sjálvum eitt yvirskot uppá 11 milliónir krónur.

– Harafturat vísir uppskotið hjá landsstýrismanninum onga sparing, ið lýsir munin millum 400 milliónir krónur og tær 276,5 milliónir krónurnar í halli, sum landsstýrismaðurin sjálvur hevur lagt fram.

– Talan er tí um beinleiðis ósannar og villleiðandi upplýsingar, sum landsstýrismaðurin leggur fram fyri almenningin, sigur Høgni Hoydal.

Hann vísir eisinni á, at tíðindaskrivið frá landsstýrismanninum hevur ikki frámerkið hjá Fíggjarmálaráðnum, soleiðis sum almenn tíðindaskriv frá landsstýrismanninum eiga at hava.

Tí er Høgni Hoydal sannførdur um, at einki embætisfólk í landinum hevði góðkent ella tikið ábyrgd av at senda villleiðandi upplýsingar til almenningin ella at senda eitt so óbúgvið tíðindaskriv út til almenningin.

– Týðiligt er, at landsstýrismaðurin ikki hevur hugsað um, at ein landsstýrismaður stendur til svars fyri lógini um ábyrgd landsstýrismanna, og at hann hevur persónliga ábyrgd av teimum upplýsingum, ið hann ber fram alment. Tíðindaskrivið er orðað sum eitt lesarabræv frá einum persóni, ið ikki hevur ábyrgd av sínum útsagnum.

– Tíðindaskrivið prógvar, at tann, ið skrivað hevur, ikki hevur innlit í politisku mannagongdirnar og ikki skilir fyrisitingarligar grundreglur. Tildømis verður sagt, at »samgongan hevur verið ígjøgnum flestu kontur á fíggjarlógini«. Vil tað siga, at ikki allar kontur á fíggjarlógini eru gjøgnumgingnar? Og hvat hevur landsstýrið so gjørt í tveir mánaðir, um tað ikki hevur verið ígjøgnum konturnar, spyr Høgni Hoydal.

Formaður Tjóðveldisfloksins heldur, at sum tíðindaskrivið er orðað, kann tað ikki vera landsstýrismaðurin sjálvur, ið hevur skrivað tað. Landsstýrismaðurin verður jú endurgivin eins og í eini samrøðu, og sjálvt ein nýggjur landsstýrismaður hevur nógv betri innlit í fyrisitingarligar og politiskar mannagongdir enn hetta tíðindaskrivið ber boð um.

– Tað er sera umráðandi hjá Løgtinginum at fáa staðfest, um landsstýrismaðurin hevur goldið privatum fyritøkum ella privatpersónum fyri at skriva eitt slíkt tíðindaskriv, sigur Høgni Hoydal.

Hann leggur afturat, at um so er, so hevur landsstýrismaðurin ikki bert goldið fyri eitt sera óbúgvið og illa frágingið arbeiði. Tá hava vit ein álvarsligan fólkaræðisligan trupulleika, har landsstýrismenn seta embætisverkið til viks og lata fólk við ongum politiskum innliti og ongari politiskari ábyrgd skriva villleiðandi upplýsingar um nakað so týdningarmikið sum landins fíggjar- og búskaparpolitikk.

Hvør hevur skrivað og ikki fáa vit svar upp á tingfundinum seinnapartin í dag, tá landsstýrismenn fara at svara munnligum fyrispurningum frá tingfólki.

# Konsert við KÍ-sangum

TÓNLEIKUR
*pop.fo*

Allir teir kendu KÍ-sangirnir verða leygarkvøldið spældir live í KÍ-høllini. Á stórari konsert fara sangarar sum Karl Martin Samuelsen, Anfinn Nielsen, Hans Jacob Nystrøm og Jógvan Mortensen at syngja, og ein væl mannaður tónleikabólkur spælir undir

Herfyri kom KÍ-bandið »Blátt og hvítt« út á fløgu. Bandið var av fyrstan tíð givið út í sambandi við Europa Cup-luttøkuna hjá KÍ í 1992, men nú felagið verður hundrað ár, eru allir teir kendu KÍ-slagararnir givnir út á fløgu eisini.

Fløgan hevur verið sera væl móttikin, og fleiri hundrað eintøk av fløguni vóru beinan vegin seld. Áhugin fyri teimum kendu sangunum í digitalum hami hevur tí verið ovurhondsstórur, og nú leygarkvøldið verður fyri fyrstu ferð nakrantíð møguleiki at hoyra allar teir kendu sangirnar spældar á konsert – alt frá »Liðið tað eitur KÍ« til »Norðingar frægir«.

Karl Martin Samuelsen, Anfinn Nielsen, Hans Jacob Nystrøm, Jógvan Mortensen og onnur fara at syngja teir sangirnar, og umframt sangirnar av KÍ-fløguni verða eisini aðrir slagarar hjá hesum sangarum spældir. Tað verður eitt ordans konsertkvøld fyri alla familjuna, har tað ber til at hoyra ein kendan sang fyri og annan eftir.

Ein tónleikabólkur við royndum tónleikarum fer at spæla undir hjá teimum ymsu sangarunum, og í hesum bólki eru Mikkjal Hvannastein, Magni Husgaard, Erik Biskopstø og Jens Pauli Joensen.

Konsertin verður í KÍ-høllini leygarkvøldið 17. apríl kl. 21.00, og umframt tónleikaliga fagnaðin á pallinum, ber tað eisini til at vitja spildurnýggju Café KÍ, sum leygarkvøldið verður latin alment upp.





## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Rúna og Dia Viðbjørg silvurbrúdleyp



Mikudagin 14. apríl hava hjúnuni Rúna og Poul Andreas Martin Viðbjørg, vanliga nevndur Dia, Kelderbjergpark 16, DK-3210 Vejby, silvurbrúdleyp.

Rúna úr Havn, dóttir Dagny og Arna Clementsen, fødd 28. oktober 1959. Hon eigur ein beiggja, Bergur, sum býr í Havn.

Dia, er klaksvíkingur, føddur 31. august 1954, sonur Nainu og Leo Viðbjørg. Hann eigur eisini ein yngri beiggja, Símun Pauli, sum býr í Klaksvík eins og mamman. Leo andaðist 5. august 1991, 60 ára gamal.

Rúna og Dia eiga tvey børn, Irdi f. 1977 og Jan f. 1980.

Dia flutti til Havnar í 1970 og lærdi til snikkara hjá Alfred Gullbein. Hann koyrdi á bilstøðini Auto í Havn frá 1984 til 1993, tá tey fluttu til Danmarkar at búgva. Har hevur hann koyrt hýruvogn og arbeitt sum handverkari.

Rúna arbeiddi í Blómuni í Runavík, og síðan tey fluttu niður, hevur hon arbeitt sum laborantur. Tey áttu egin hús á Glyvrum.

Dagurin verður hildin fyri innbodnum.

Teimum verður ynskt hjartaliga tillukku við degnum.

**Hansemann & Co**

## Poul Schlüter 75 ár



3. apríl fylti fyrrverandi danski forsætisráðharrin Poul Schlüter 75 ár.

Hann er framvegis virkin. Eftir at hann var givin som forsætisráðharri, var hann limur í Europa-Parlamentinum frá 1994-99, trý tey fyrstu árini var hann varaforseti.

Síðan januar 2003 hevur hann arbeitt við ymiskum uppgávum innan Nordisk Ministerråd.

Poul Schlüter var limur í danska fólkatinginum fyri Konservativt Folkeparti í 30 ár, frá 1964-94. Hann var formaður í flokkinum frá 1974-82 og danskur forsætisráðharri frá 1982-93.

Poul Schlüter er føddur í Tønder i Suðurjútlandi 3. apríl 1929. Hann bleiv studentur í Haslev í 1948 og útbúgvin sum sakførari í 1957. Hann arbeiddi sum sakførari við fundarrætti í hægstarætti.

Hann varð valdur sum "Årets politiker i Norden" í 1984, og skrivaði bókina "Sikken et liv" í 1999.

# Fundur um orku í Norðurlandahúsinum

**"Frá steionolju til framtíðar varandi reina orku – globalur tørvur við støði í lokalum tilfeingi", verður heitið á fundi, sum FNU skipar fyri í Norðurlandahúsinum hósdagin 15. apríl**

TÍÐINDASKRIV



*Erling Simonsen er formaður í FNU*

Hósdagin 15. apríl frá kl. 16.00-18.00 skipar Føroya Umhvørvisverndarfelag (FNU) fyri fundi um orku í Klingruni í Norðurlandahúsinum undir heitinum: "Frá steinolju til framtíðar varandi reina orku – globalur tørvur við støði í lokalum tilfeingi".

Fundurin byrjar við at formaðurin í FNU, Erling Simonsen, bjóðar vælkomin. Síðan verður tað stjórin fyri Folkesentret for vedvarende energi í Thy, Preben Maegaard, sum fær orðið. Eftir hann hava Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í orkumálum, og Klæmint Weihe, stjóri í SEV, hvør sítt innlegg. Aftaná verður pallborðsorðaskifti, har høvið verður at seta spurningar.

## Dagurin

**14. apríl. Summarmáli**. Eftir gamlari føroyskari tíðarrokning byrjar summarhálvárið henda dag. Sagt var, at á summarmála avdagast ikki, tí var klárt í veðrinum, skuldi dagsglæman ikki hvørva. Soleiðis sum summarmáladagur er, soleiðis várið.

Lundin kemur á summarmála, og um gamla summarmála (26. apríl) reinsar hann holuna. Eisini sigst steinstólpa at koma á summarmála.

Dagurin eitur annars Tiburtius. Saman við bróður sínum varð hann tikin av døgum umleið ár 225. Føroyskt navn er Bursi.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu, hjálpsemi og umsorgan, tá kæra kona og móðir okkara

**Inger Hansen**
Fuglafjørður

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir og tøkk til tykkum øll, ið fylgdu Inger til hennara seinasta hvíldarstað.

**Atli og Christian**